

## Súni spælir aftur

Súni Olsen hevur drigist við skaða í fleiri mánaðir, men nú er ljós fyri framman. Súni hevur vant seinatu tíðina, og um vikuskiftið spældi hann ein hálvleik við eykaliðnum. Tað gekk væl hjá føroyska spælarunum, og nú skuldi veruliga vón verið fyri, at hann kann taka kappingina uppaftur við teir, sum vilja spæla á besta liðnum í felagnum. Jón Rói Jacobsen, sum fekk álvarsaman knæskaða, verður ikki førur fyri at spæla fyrr enn eftir ársskiftið.

## Fittir finalistar

Tað varð eftir øllum at døma ikki tað stóra krútið í steypafinalistunum í gjárkvøldið. Hvørki KÍ ella B36 kláraðu at vinna sínar heimadystir, og hvørki av liðunum fekk nakað gult kort. Í Klaksvík dømdi Eiler Rasmussen, og hann gav gestunum úr Gøtu trý gul kort, heimaliðið fekk einki kort. Í Havn var Lars Múller dómari, og hann fann heldur onga orsøk til at geva steypavinnarunum úr B36 nakað gult kort. Skála fekk eitt gult kort í friðarliga og javna dystinum.

# Christian gongur í góðum skúla

**Venjarin hjá Manchester City fegnast um, at felagið støðugt klárar at menna ungar spælarar til besta liðið í felagnum. Føroyingurin Christian Restorff Mouritsen er ein av ungu spælarunum í felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Stuart Pearce er væl nøgdur við venjingina av teimum ungu spælarunum í Manchester City*

Venjarin hjá enska Premier League-felagnum Manchester City, Stuart Pearce, er væl nøgdur við arbeiðið, sum fótbóltsskúlin hjá felagnum ger. Nógvir ungir spælarar, sum eru vaksnir upp í felagnum, hava sligið til á besta liðnum í felagnum, og tað er ein dreymur fyri eitt felag í einum heimi, har spælarar kosta nógvar pengar at keypa frá øðrum feløgum.

- Fótbóltsskúlin hjá okkum ger eitt gott arbeiði og hevur klárað at latið nógvar góðar ungar spælarar til besta liðið. Hetta er júst tað, sum felagið hevur brúk fyri, sigur Stuart Pearce við heimasíðuna hjá Manchester City.

- Felagið mennir seg støðugt, og okkara ungu spælarar, sum koma ígjøgnum fótbóltsskúlan, eru væl fyri. Hetta vísir, at tey, sum varða av ungdómsvenjingini, hava funnið røttu spælararnar og hava vant teir væl, sigur City-venjarin.

### Christian mennist

Ein av ungu spælarunum í Manchester City er havnamaðurin Christian Restorff Mouritsen, og hann hevur gjørt stóra framgongd í Manchester City seinnu árini.

Christian spældi við føroyska U19 landsliðnum í EM-undankapping herfyri, og har skaraði hann framúr á føroyska liðnum. Hann var eisini mettur millum bestu spælararnar í kappingini yvirhøvur.

Christian hevur spælt fleiri dystir við eykaliðnum hjá Manchester City, og hann hevur fingið ein vaksmannasáttmála við felagið, eftir at hann byrjaði sum lærlingur á Academy hjá Manchester City.

### B36 – Skála 2-2 (1-0)

1-0: Fróði Benjaminsen, 32.
2-0: Bergur Midjord, 75.
2-1: Bogi Gregersen, 76.
2-2: Debus Danielsen, 82.
Dómari: Lars Müller
**B36:** Jákup Mikkelsen – Ásbjørn V. Gunnarsson (Johan Ellingsgaard, 77.), Klæmint Matras, Herbert í Lon Jacobsen, Jóhan V. Gunnarsson – Hanus Thorleifsson, Mikkjal Thomassen, Fróði Benjaminsen (John Hansen, 66.), Alex José dos Santos – Amed Sylla Davy (Sjúrður Thomassen, 54.), Bergur Midjord.
Gult kort: einki
**Skála:** Vlada Filipovic – Pætur Dam Jacobsen, Rúni Rasmussen, Milan Curcic, Jóhan Troest Davidsen – Bjarni Jørgensen (Debus Danielsen, 61.), Levi Hansen, Pauli G. Hansen (Bogi Gregersen, 46.), Nenad Stankovic, Alexandur Johansen (Bárður Danielsen, 61.) – Jónhard Fredriksberg.
Gult kort: Bárður Danielsen.

### formuladeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 26 | 16 | - | 6 | - | 4 | 63 | 29 | 34 | 54 |
| 2 HB | 26 | 15 | - | 7 | - | 4 | 59 | 36 | 23 | 52 |
| 3 B36 | 26 | 12 | - | 8 | - | 6 | 43 | 31 | 12 | 44 |
| 4 KÍ | 26 | 11 | - | 9 | - | 6 | 53 | 39 | 14 | 42 |
| 5 GÍ | 26 | 10 | - | 11 | - | 5 | 38 | 32 | 6 | 41 |
| 6 NSÍ | 26 | 11 | - | 6 | - | 9 | 48 | 39 | 9 | 39 |
| 7 Skála | 26 | 7 | - | 9 | - | 10 | 32 | 28 | 4 | 30 |
| 8 VB/S | 26 | 5 | - | 4 | - | 17 | 23 | 72 | -49 | 19 |
| 9 B68 | 26 | 4 | - | 6 | - | 16 | 34 | 56 | -22 | 18 |
| 10 ÍF | 26 | 4 | - | 4 | - | 18 | 29 | 60 | -31 | 16 |



### KÍ-GÍ 1-4 (0-2)

0-1: Áslakur R. Petersen
0-2: Sverri Jacobsen
0-3: Sverri Jacobsen
1-3: Christian Lundberg
1-4: Martin Olsen
Dómari: Eiler Rasmussen
**KÍ:** Meinhardt Joensen – Kristoffur Jakobsen, Jan Andreasen, Atli Danielsen, Marek Wierzbicki – Hjalgrím Elttør, Símun Joensen, Christian Lundberg, Heðin á Lakjuni – Paul Clapson, Erling Fles (Oddmar á Lakjuni, 56.)
Gult kort: Eingin
**GÍ:** Geza Turi – Áslakur R. Petersen, Niclas Niclasen, Kaj Ennigarð, Magni Jarnskor – Poul Arni Jacobsen (Jónreid Dalheim, 68.), Sam Jacobsen, Símun Louis Jacobsen (Johan Dávur Højgaard, 75.), Hanus Jacobsen – Gunnar Nielsen (Martin Olsen, 82.), Sverri Jacobsen
Gult kort: Símun Louis Jacobsen, Sverri Jacobsen, Niclas Niclasen

### Formulaliðið

Ítróttar-Sosialurin mannar vikuliðið við spælarum, sum stóðu seg væl í 26. umfari av Formuladeildini

